**ARBEIÐSEFTIRLITIÐ**

*Administration of Occupational Safety and Health*

Fútalág 1B ✪ P.O.Box 1134 ✪ FO-110 Tórshavn ✪ Faroe Islands

Tlf. +298 317811 ✪ Fax +298 314489 ✪ E-mail: info@arbeidseftirlit.fo

***Skrásetingar nr.:***

**L-B007-1**

# Leiðbeining
# um
# rør-byggipallar

Seinastu árini eru hópin av nýggjum byggipallum komnir fram á arbeiðsmarknaðinum, og gomul útgerð, so sum træstiga-pallar, ið seinastu 50 árini hevur verið nýtt, er nærum burtur, og verða nú ístaðin næstan bert rør-byggipallar brúktir.

Av tí at teir nýggju byggipallarnir eru so nýliga komnir, eru ikki nakrar beinleiðis reglur, ið siga nakað serligt um hesa nýggju útgerð.

Arbeiðseftirlitið metir tí, at tað er neyðugt og gagnligt við eini leiðbeining við góðum ráðum, ið eru hesi:

**1.** Lítil byggipallur er slíkur, sum í høvuðsheitinum bert skal tola vektina av teimum persónum, sum arbeiða á pallinum.

**2.** Byggipallurin skal vera soleiðis háttaður, at hann alla staðni á flatuni tolir 150 kg. *(Fig. 1)*

**3.** Tá byggipallur skal reisast, broytast ella takast niður, skal hetta gerast av fólkum, sum hava skil fyri slíkum arbeiðið, og har tað verður mett neyðugt, undir serkønari leiðslu




*Fig. 1*

***Lógarheimild:***

Kunngerð nr. F-160-1 frá 4. september 1995

***Útgivið fyrstu ferð:***

**15. juli 1992**

***Seinastu broytingar:***

**4. december 1997**

**4.** Uppseting av byggipalli skal ikki nervast av ferðslu ella øðrum arbeiði. Um byggiøkið ikki kann avbyrgjast, skal setast upp ein haldgóð portursgongd, sum tolir vektina av byggipallinum. *(Fig. 2)*



*Fig. 2*

**5.** Byggipallar, sum eru hægri enn 30 m, skulu frá serkønum hava váttan um berievni.

**6.** Tá byggipallur verður settur upp á tekju, svala ella líknandi, skal berievni kannast frammanundan.



*Fig. 3*

**7.** Til festi skal nýtast upprunatilfar ella aðrir eyðsýnt hóskiligir lutir. Rør og træ skal t.d. ikki setast saman við vanligum tvingum við flatari spenniskivu og ás. *(Fig. 3)*

**8.** Har arbeiðast skal við byggipalli í longum tíðarskeiði, skal uppgongd verða í skilarúmi fyri seg. *(Fig. 4)*



*Fig. 4*

**9.** Leytari, sum er reystari enn 70°, skal hava ryggverju frá 2,5 m hædd. *(Fig. 5)*




*Fig. 5*

**10.** Byggipallur skal festast í fótpetti við plátu. Fótpetti verður fest á planka, tó bert har tað er neyðugt fyri berievni á palli. *(Fig. 6)*



*Fig. 6*

**11.** Uppsetingin skal vera nágreinilig vatnrætt og loddrætt.



*Fig. 7*

**12.** Tá byggipallur skal setast á kubbar, skal hóskandi tilfar nýtast. Múrsteinar e.l. eigur ikki at nýtast. Kubbar mugu ikki verða hægri enn 20 cm. Um plankar verða nýttir, skulu hesir neglast saman. *(Fig. 7)*

**13.** Bein, sum kunnu stillast í hædd, skulu verða minst 10 cm inni í rørinum, og møguleiki skal vera fyri at kanna hetta. *Fig. 8*



*Fig. 8*

**14.** Bein, sum skulu stillast og eru meir enn 60 cm. skulu skorðast báðar vegir. *(Fig. 9)*



*Fig. 9*

**15.** Byggipallur verður festur í húsavegg á 2. hvørjari hædd - tó skal karmurin festast í erva. (Samsvarar við festi fyri umleið 15. hvønn fermetur av húsaveggi). Skrástívarar verða festir í skiftandi leiðir. Í neðra, har karmurin ikki kann festast nóg væl, skulu skrárør setast í, sum eru haldgott fest í neðra. *(Fig. 10)*

**16.** Byggipallur verður skrástívaður framvið húsaveggi við skrárørum, tó uttan so at konstruktiónin - t.d. haldgott rimaverk ger pallin stinnan í sjálvum sær.



*Fig. 10*

**17.** Festið eigur at virka, bæði tá togað og trýst verður (inn og út).

**18.** Festið í húsavegg skal verða haldgott, t.d. við sterkum eygaskrúvum og rawplugs. *(Fig. 11)*
Haldgott timburtilfar kann eisini nýtast til festi. Har poknutur múrveggur er, skal serlig fyriskipan gerast, t.d. kann eitt rør førast gjøgnum múrin og festast við stopklemmu. *(Fig. 12)*



*Fig. 11*

**19.** Girðing umleið 1 m í hædd skal vera við hond- og knælista.

**20.** Gólvið skal vera eins breitt og byggipallur, vanliga ikki minni enn 0,5 m.



*Fig. 12*

**21.** Gólvið skal vera úr 2" x 7" plankum ella flakum í somu styrki.

**22.** Fráleikin millum stólparnar undir plankunum, skal hægst vera 3,5 m. Er fráleikin longri, skulu plankarnir surrast á miðjuni, til stuðul.

**23.** Byggipallurin skal setast upp, á hóskiligum stað á húsavegginum, har tað er høgligast fyri arbeiðið, vanliga við hægst 30 cm. fráleika. Har vandi er fyri at detta niður millum byggipall og húsa-vegg, ella gjøgnum op í vegginum, skal rimaverk ella múrsnøs setast upp. *(Fig. 13)*



*Fig. 13*

**24.** Tá fleiri pallar skulu setast upp, skulu eisini eyka festi til. Har neyðugt er at byggja fleiri pallar oman á hvønn annan, t.d. við kirkjutorn, krevst váttan frá serkønum um berievni.

**25.** Har tað eisini verður sett upp trygdarverja, skal eyka festi gerast. Í hæddum skal net nýtast sum trygdarverja.

**26.** Har motorrikið spæl verður nýtt, skulu eyka skrástívarar og festi til.

**27.** Um presenning er um byggipall ella partar av honum, er vanligt festi í múr ella húsavegg als ikki nóg mikið.

**ARBEIÐSEFTIRLITIÐ**, hin 15. juli 1992.

Eli Davidsen, stjóri (sign.)